gøtudreingir í knattspyrnuleiki, sum hann sjálvur vildi tikið til. Ein fremmandur maður var komin til bygdar, og hann kollvelti øllum við strongum íslendskum vilja, aga og óræddari framsøkn.



*Gøtu kommuna keypti ein bil í 1926. Poul Kristoffur Poulsen var bilstjóri. Sjálvur keypti hann sín fyrsta bil í 1932. Bilurin á myndini kom til Gøtu í 1936. Hann hevði onga last, táið hann kom til bygdina, og var settur oman fyri húsini í Úti Guttastovu, har hann varð rustviðgjørdur og málaður og eftir tað gjørdi hin kendi handverkarin og yrkjarin Jákup Hansen – vanliga róptur Havna Jákup – hús á hann. Á myndini situr Poul Kristoffur við róðrið, meðan kona hansara – Kunoyar Jóhanna – situr á baksetrinum.*

Hugtakið kondition var eitt sindur fremmant í fótbóltshugnanum, sum hevði verið, nú tuskaðu menn niðan á fjøllini og omanaftur, men úrslitini komu skjótari enn nakar hevði væntað. Longu í 1976 og 1977 vunnu nakrir ungir gøtudreingir føroyameistaraskapin og steypakappingina í unglingadeildini. Í 1979 vunnu teir aðru deild og longu í 1983 lógu teir ovastir í bestu deildini. GÍ var nú eitt felag, ið hevði sett seg í respekt í føroyska fótbóltsheiminum.

Andreas var við í hesum. Og serliga minnisrík mundi ferðin til Íslands í 1976 vera hjá hesum tannáringum. Gisli fór við teimum allan vegin út í Oyggjarnar. Á sjálvari tjóðarhátíðini hjá frændunum fyri vestan leiktu teir ímóti unglingunum hjá ÍBV. Sjóverkurin hevði hertikið fleiri teirra á ferjuferðini, somikið, at teir spýðu á vøllinum, tí gekst heldur striltið í fyrra hálvleiki, men hann makaði í seinra hálvleiki, og við dystarlok høvdu teir kneykrað ÍBV við tveimum málum ímóti einum. Á hesi ferðini hittu teir eisini hin blídliga Kolbein, skyldmann okkara, sum er búsettur í Oyggjunum. Hann er sonur hin fyrr nevnda Óla Poulsen, ofta róptur Óli Prest ímillum manna.

Seinri gjørdist Andreas ein kendur linjuverji og dómari. Íðin tók hann lut í tí organisatoriska arbeiðnum, og hann gjørdist seinasti formaðurin í gitna felagnum GÍ. Harvið var hann í broddi fylkingar, táið gøtumenn og leirvíkingar kastaðu fótbóltspjøkarnar saman í felagnum "Víkingur", sum hevur heimavøll á hinum eftirhondini traditiónsríka vøllinum í Sarpigerði.

Andreas hevði mong áhugamál, men seinastu mongu árini hevur hann bygt upp sítt egna virki. Á ein hátt var hann rættiliga klassiskur í valinum, og tó, hann byrjaði frá botni av, við egnari megi, og við ómetaliga góðari hjálp frá konuni Poulu, hevur hann hesini árini fingið í lag eina fyritøku, sum hevur ein stóran flota av bussum koyrandi eftir føroysku vegunum og uttanlanda við, táið tað krevst. Tey hava verið kend fyri góða tænastu, vinskipiligheit og laðaligheit. Viðskiftafólk teirra, sum eg havi tosað við, taka til, hvussu einastandandi servisan hevur verið, har hava ongir lepar hingið uppi við nakra staðni. Andreas var altíð tøkur hjá øllum, sum høvdu boð eftir honum, og tað man mangan hava verið strævið. Ómetaliga stríggið. At reka egna fyritøku í framsøkn er ikki hvørsmansføri, tað krevur og terur. Mannalikamið hevur eisini síni mørk, men í stóra ljóshavinum hevur tíðarmálið kanska ikki so stóran týdning, tað er heldur og meira ein spurningur um hvør tín lutur var í menninginni framá, - til frama fyri tey ið eftir koma. Tað má hava verið eitt spennandi og magnríkt lív í hálvthundrað ár, at vera farin ígjøgnum allan strongin frá fakfelagsbossi til arbeiðsgevara, og eisini tað megnaði tú. Við egnari megi og góðari hjálp frá fjølskylduni, sum altíð bakkaði upp og akslaði skinn síni við tær og tínum áhugamálum.

Góði Andreas, í so máta lá tín partur ikki eftir. Tín ferðmikli fasongur, títt stutta og lítið ímynta fjús, títt óvanliga skemtingarsama lyndi og títt sjarmerandi vesin hevur verið av slíkum slagi, at tað rúmaði einum yvirskoti, sum var øðrum til fjálganar og nyttu. Ei dáni í, at tað fór ein ísakaldur gjóstur ígjøgnum bygdina, hendan dagin, táið feigdin gjørdi um seg og deyðsboðini komu úr Keypmannahavn. Tey eru so fá, hesi menniskjuni, vegararnir, sum brúka orkuna á tamb, í ríkiligt mát, - til annað enn bara sín egna eksistens. Uppdriftin var so øgilig. Kærleikin til bygdina, samfelagið og tjóðina logaði so bjartur uppi við hjarta og heila tínum. Gapandi tóma gjógvin, sum nú stendur eftir tær í bygdasamfelagnum í Gøtu, fyllist ikki aftur í bræði. Meinast rakar tín bráði deyði Poulu og børnini og mammu tína Margith, sum hevur verið mær so góð í ávikum í mínum politiska starvi, á sama hátt sum pápi tín, fyri tað. Og tað var nú løgið, táið tað nú skuldi henda, at tú alt ov ungur var tikin frá okkum, at tú lát lívið á degnum – 21. januar – júst átta ár eftir at pápi tín fór higani. Mátti hin góði Guð hjálpt og staðið tær við lið á ferðini heim til fedrarnar, ið undan eru farnir, og mátti Hann á sama hátt troysta og styðja tykkum uppi í Tungu, ið eftir sita í ovurstóra sakninum. Soleiðis er tá deyðin virksamur í okkum, men lívið í tykkum.

Hvíl í friði og farvæl kæri frændi.

**Tórbjørn Jacobsen**

---

†

Kunngjørt verður, at elskaði pápi, verpápi og abbi

**Eilert Mikkelsen**
**Tórshavn**

andaðist sunnukvøldið í heiminum, 82 ára gamal.

Farið verður úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum mikukvøldið kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju hósdagin kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Guðrun og Halla**

---



# TØKK

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá okkara elskaði sonur, beiggi, svágur, mammu- og pápabeiggi

**Signar Haraldsen**

so knappliga bleiv tikin frá okkum.

Tøkk til urguspælara og til Steinhólm prest fyri góð orð í kapellinum og til tykkum øll, ið komu til andaktina.
Tøkk til Ingu Poulsen Dam prest fyri troystarrík orð í kirkjuni, til sangarar og berarar og til kirkjutænarar og gravara. Tøkk til tykkum øll, sum á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferð og ervi.
Tøkk fyri blómur og fyri peningagávur til Hjartafelagið. Tøkk til tykkum frá Vaktar- og Bjargingartænastuni, ið møttu so fjølment at siga Signar eitt síðsta farvæl og til tykkum mongu, sum fylgdu honum til hansara síðsta hvíldarstað.

*Við ynskjum um eitt gott nýggjár*
**Mamma**
**Majken, Jónsvein, Ann**
**og Jákup-Aksel við familjum**

---

# TØKK

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu og stórt hjálpsemi, tá okkara kæri maður, pápi, verpápi, abbi og bróðir

**Símun Jóhan Wolles**
**bátasmiður**
**Eiði**

doyði og varð jarðaður.

Stóra tøkk fyri peningagávur til Zarepta, og tøkk tit mongu, sum fylgdu honum til gravar.

*Familjunnar vegna*
**Marjun,**
**Jóhanna Oluffa, Asta, Óli og Absalon**